VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG

Løgtingsskrivstovan
Postboks 208
FO-110 Tórshavn

Tórshavn 18. november 2020

Att.: Anna Rein

Hoyringsskriv um broytingaruppskot um barsilsskipanina

Víst verður til broytingaruppskot í løgtingslóg um barsilsskipanina, sum er lagt fram fyri løgtingið tann 30. september 2020.

Føroya Arbeiðsgevarafelag átalar staðiliga, at broytingaruppskot verða løgd fyri løgtingið uttan at hava verið til hoyringar hjá viðkomandi pørtum frammanundan.

Barsilslógin er broytt 15 ferðir síðan lógin kom í gildi í 2001. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í hoyringssvarum til barsilsskipanina seinastu árini fleiri ferðir gjørt vart við, at skipanin í síni heild tørvar eina eftirmeting og tillaging til føroysk viðurskifti. Hetta fyri at sleppa undan at gera smærri og størri broytingar við jøvnum millumbilum, men heldur at viðgera alla barsilsskipanina og síðani lata skipanina virka í frið yvir eitt longri tíðarskeið.

Hetta broytingaruppskotið snýr seg um at hækka inngjaldið, at leingja rættin til barsilspening til 52 vikur eftir barnsburð og at leggja kærunevndirnar hjá Barsilsskipanini og Arbeiðsloysisskipanini saman.

Í mun til samanlegging av kærunevndunum er talan um tvær nevndir, sum hava við arbeiðsmarknaðarmál at gera. Kærunevndirnar báðar eru mannaðar við somu umboðum og við sama setanarskeiði. Tí verður hetta mett at verða ein skilagóð loysn, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur undir við.

Seinastu ferðirnar, útgjaldstíðarskeiðið í barsilsskipanini er longt, hevur inngjaldið verið óbroytt. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í hoyringsskrivi undrast á, um ráðiligt hevur verið áhaldandi at leingja útgjaldstíðarskeiðið í barsilsskipanini uttan at hækka inngjaldið. Hetta vísir seg nú at hava verið ein óheppin gongd, nú peningur vantar í barsilsskipanini um ársskiftið. Tað er umráðandi at tryggja, at samsvar er millum inntøkur og útreiðslur, tá slíkar broytingar verða gjørdar.

Seinast barsilstíðarskeiðið varð longt á vári 2019 og útreiðslurnar harvið hækkaðu, varð í uppskotinum skrivað, at roknað varð við einum avlopi á 1 mió. kr. í 2020 og 500 tús. kr. í 2021. Nú vísir tað seg kortini verða neyðugt at hækka inngjaldið munandi. Hetta vísir tørvin á at hava eina veruliga eftirmeting av skipanini, har øll viðurskifti verða viðgjørd nágreiniliga.

Í viðmerkingunum til lógarupskotið eru útrokningar fyri Barsilsskipanina yvir fíggjarligu gongdina komandi árini. Í framrokningini er bæði inntøku- og útreiðsluvøksturin framroknaður við 1,5% um árið. Til hetta skal Føroya Arbeiðsgevarafelagi vísa á, at inngjaldið er knýtt lutfalsliga at lønarútgjaldingum, meðan eitt hámark á kr. 25.000 um mánaðin er á útgjaldinum. Tí hækka inngjald og útgjald ikki neyðturviliga í sama lutfalli komandi árini, og spurningurin er, um hækkingin frá 0,71% upp í 0,86% er óneyðuga stór. Sum skilst er Umhvørvis- og vinnumálaráðið varugt við hetta, og tey viðgera í løtuni, hvørja ávirkan hetta hevur á ætlaðu hækkingina í inngjaldinum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag eftirlýsir eina heildarviðgerð av lógini um barsilsskipan, har landsstýrið, saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, eftirmeta skipanina í mun til dagsins arbeiðsmarknað og familjulív. Viðurskifti sum eitt nú longd á barsilsskeiði, útgjaldsskeiði, hámarksútgjald, og býtið millum foreldrini eigur at verða viðgjørd í einari heild. Harumframt er týðandi, at barsilsskipanin tryggjar, at fólk ikki missa tilknýti til arbeiðsmarknaðin, tá tey eru í barsilsfarloyvi. Hetta er alt partur av eini breiðari viðgerð

av skipanini í síni heild, og Føroya Arbeiðsgevarafelag heitir enn einaferð á landsstýrið um at fara undir hetta yvirskipaða arbeiðið.

Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur sostatt ikki undir við at leingja barsilstíðarskeiðið og felagið metir ikki, at orsøk er til at skunda hesar broytingar ígjøgnum júst nú uttan neyðuga viðgerð. Barsilsskipanin er ein sera grundleggjandi og týðandi skipan fyri allan arbeiðsmarknaðin, og tí eiga avvarðandi partar at viðgera skipanina í felag, áðrenn týðandi broytingar verða framdar. Talan er um eina lutfalsliga stóra hækking, og tí krevjast góðar grundgevingar fyri at hækka inngjaldið.

Føroya Arbeiðsgevarafelagv skal eisini vísa á, at føroyska barsilsskipanin longu áðrenn broytingarnar er ein av teimum bestu skipanunum í Norðurlondum, og harvið eisini í øllum heiminum. Tí er eingin akuttur tørvur á at gera broytingar í skipanini uttan eina nærri viðgerð.

Vinarliga
Føroya Arbeiðsgevarafelag

Jórun Gardar